

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 01 - 2012

# Staturin kann bara tingast við Mærsk

Samtakið Dansk Undergrunds Consortium (DUC) stendur fyri 90 prosentum av oljuframleiðsluni í tí danska partinum av Norðsjónum, men tá danska stjórnin tingast við samtakið, er tað bara tann eini parturin av samtakinum nevnliga A.P.Møller Mærsk, sum situr hinumegin borðið. Hetta ger, at tann danski staturin er í einari veikari samráðingarstøðu. Tað sigur norðmaðurin Øystein Noreng, sum professari í oljubúskapi, við blaðið Information. Tann nýggja samgongan í Danmark hevur boðað frá, at hon fer at endurskoða avtaluna um oljuna í Norðsjónum, og norski professarin mælir politikarunum til at nýta hetta høvið til at broyta verandi skipan. -Í Noregi hava vit tingast við fleiri feløg, og tað hevur skapt eina vanliga kapping. Danmark missir møguleikan til at noyða feløgini at kappast og at sleppa sær av við feløg, sum ikki fáa nóg mikið burtur úr einari oljuleið, sigur Øystein Noreng við Information. Hann sigur tað vera heilt ófatiligt, at Danmark hevur góðtikið, at alt samskiftið við DUC skal ganga ígjøgnum Mærsk. Fleiri serfrøðingar siga, at tann danski staturin hevur mist eftirlit og ávirkan við at lata alt samband ganga ígjøgnum Mærsk. Eisini fyrrverandi orkumálaráðharrin Poul Nielson heldur tað vera ein trupulleika, at staturin ikki hevur betri tak á meirilutanum av DUC, tí tað er altíð Mærsk, sum situr hinumegin.